TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar skúlaárið 2005/2006

## Skúlarnir í Havn, Hoyvík og á Argjum

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1999 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum týsdagin 25. ella mikudagin 26. januar 2005.

**Innskrivingin**

í allar omanfyrinevndu skúlarnar er í býráðssalinum **týsdagin 25. og mikudagin 26. januar, báðar dagarnar frá kl. 15.00 til 18.00. Havið dóps-/ navnabræv við.** Eisini ber til at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 254010.
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Skúlaumbøn**

Tað ber til at biðja um at fáa barn/ børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Argja skúli**

Næmingar í Argja skúla fara í skúla kl. 11.45, men kunnu fara í frítíðarskúla fyrrapart.

**Hoyvíkar skúli**

Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í frítíðarskúla fyrrapart.

## Skúlarnir uttanfyri høvuðstaðarøkið

**Kollafjarðar skúli**

Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **týsdagin 25. januar kl. 15.00.** Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**

Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum **týsdagin 25. januar millum kl. 16.00 og 17.00** ella á tlf. 515398.

**Velbastaðar skúli**

Innskrivingin í Velbastaðar skúla er í skúlanum ella á tlf. 328006.

**Nólsoyar skúli**

Innskrivingin í Nólsoyar skúla er í skúlanum ella á tlf. 327033.

**Hests skúli**

Innskrivingin í Hests skúla er í skúlanum ella á tlf. 211702.

## Frítíðarskúlin

Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til frítíðarskúla í Snarskivuni, á heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 302010.

**Meiri fæst at vita**

um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, mentamálaleiðara, tlf. 302010.

**Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar**
**Mentamáladeildin**

Sosialurin

Sosialurin

i



# Stuðul frá FITUR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarv millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttarfeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald

Umsóknir skulu skrivast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálsráð Íslands**
**Lækjargata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

Umsóknir verða viðgjørdar tríggjar ferðir um árið.
Evstamørk fyri at senda inn umsóknir eru
- 10 február fyri tiltøk í tíðarskeiðnum 10. február til 10. juli
- 10. juni fyri tiltøk í tíðarskeiðnum 10. juni til 10. november
- 10. oktober fyri tiltøk í tíðarskeiðnum 10. oktober til 10. mars

Nærri upplýsing og umsóknarblað fæst á ferðaráðunum, á www.tourist.fo og á www.icetourist.is

ÍSLAND • FØROYAR

